## Fiskimenn væl nøgdir

Í Danmark eru fiskimenninir fegnir um ta nýggju semjuna um norðhavssildina, tí semjan ger, at teir nú sleppa at fiska meiri sild enn í fjør. Harafturat er tað ein stórur fyrimunur fyri tey donsku skipini, at tey nú sleppa at fiska sild í norskum sjógvi. Hans Christian Schmidt, ráðharri í fiskivinnumálum, sigur, at nýggja semjan man vera eina 100 mió. krónur verd fyri danska fiskiflotan, og harafturat fara sildavirkini á landi at fáa stórt gagn av henni.

## Tóroddur í Norðurlandahúsinum

Sunnudagin fer Tóroddur Poulsen at framføra egin verk í Norðurlandahúusinum. Tiltakið er fingið í lag, samstundis sum Tóroddur og Bjarne W. Sørensen hava framsýning við grafikki, sum er gjørdur á Grafiska Verkstaði Føroya. Tann framsýningin er eisini í Norðurlandahúsinum. Framførslan hjá Tóroddi sunnudagin verður í Klingruni kl. 16 og er almenn. Grafikkframsýningin er opin til og við 31. januar.

# Lang røð av rúsevnismálum

**Fyrr í vikuni var ein 20 ára gamal maður dømdur hálvtannað árs treytaleyst fongsul, fyri at hava tikið ímóti næstan 400 ecstasy-tablettum og 100 gramm av amfetamin. Í kjalavørrinum av tí hevur sjúkrarøktarfrøðingur á Heilbrigdinum sagt, at ung niður í skúlaaldur royna ecstasy, men læknaligi leiðarin á psykiatriska deplinum sigur, at misnýtslumynstrið er óbroytt**

RÚSEVNI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Týsdagin varð ein 20 ára gamal maður dømdur hálvtannað ára fongsul, í einum rúsevnismáli*
*(Tilvildarlig mynd)*

Stóra ecstasymálið hevur fylgt nógv í hinum miðlunum, og her verður tikið saman um í málinum.

Leygardagin í næsta síðstu vikum skrivaði Portalurin, at ein 25 ára gamal føroyingur var varðhaldsfongslaður í Keypmannahavn, skuldsettur fyri at hava smuglað rúsevni til Føroya.

Týsmorgunin byrjaði eitt stórt rúsevnismál í Føroya Rætti, tá dómsviðgerðin móti einum 20 ára gomlum manni byrjaði. Hann var ákærdur fyri at hava tikið ímóti og selt ecstasy og amfetamin.

Seinni týsdagin gjørdist greitt, at maðurin hevði játtað seg sekan í at hava tikið ímóti og selt næstan 400 tablettir av ecstasy og 100 gramm av amfetamin.

Tann 20 ára gamli hevur sitið í varðhaldi síðani 1. desember, og hendan tíðin verður drigin frá dóminum, sum er hálvtannað árs treytaleyst fongsul. Í rættinum týsdagin bað maðurin um 14 dagar umhugsanartíð, hvørt hann tekur við dóminum, ella hann skjýtur hann inn fyri landsrættin.

20 ára gamli maðurin er tann fyrsti í einari røð av málum um sterk rúsevni, sum eru flutt til Føroya og seld her. Tvey onnur fólk sita framvegis varðhaldsfongslað, skuldsett fyri at hava smuglað og selt sterkari evni. Annað teirra er ein 30 ára gomul kvinna, sum situr í Føroyum og varð tikin um sama mundið sum tann nú dømdi. Hin er ein 25 ára gamal, sum varð tikin í Danmark leygardagin í næst síðstu viku. Fleiri onnur eru skuldsett í sama máli.

**Ecstasy um alt landið**

Útvarpið fylgdi málinum upp mikudagin, við samrøðu við Karin Tummasdóttir, sjúkrarøktarfrøðing á Heilbrigdinum á Velbastað.

Karin Tummasdóttir segði, at ecstasy er eitt evni, sum tey ungu kenna og hava atgongd til kring alt landið. Á Heilbridginum síggja tey, at ecstasy og amfetamin ofta eru ein partur av misbrúkinum hjá teimum, sum koma í viðgerð.

– Ung heilt niður í skúlaaldur royna ecstasy, ið er at fáa kring alt landið, segði hon við Útvarpið.

**Nógv heroin eisini**

Karin Tummasardóttir segði, at ecstasy fæst um alt landið og at ung heilt niður í skúlaaldur kenna evnið. Hósdagin segði Árni Rein, leiðari fyri viðgerðini á Velbastað, við Dimmalætting, at tað serliga eru tey ungu, ið taka ella hava roynt ecstasy. Men ecstasy er ikki altíð at fáa í Føroyum, men so fáa misnýtararnir sær hendur á øðrum evnum, tí tey eru ikki kræsin í so máta.

- Vit hava havt misbrúkarar heilt niður í 20 ára aldur, og eg haldi, at allir ungir misbrúkarar hava roynt eisini tey sterku evnini, segði Árni Rein við Dimmalætting. Tá tosað verður um sterk evnir, verður ofta hugsað um stesolid, amfetamin, ecstasy, kokain og heroin, sum er tað sterkasta.

- Tað er nógv heroin í Føroyum, bæði til at roykja og spræna í æðrarnar, sigur leiðarin fyri viðgerðini á Heilbrigdinum, sum eisini heldur tað vera gott, um ein nevnd varð sett at gera eina mynd av rúsevnismisnýtsluni í Føroyum, eins og Eyðun Berg, formaður í Føroya Politistafelag, førdi fram í farnu viku.

# Fyribyrgingarleiðarin ikki bilsin

**Rúsevnir eru millum ung og tað í ólukkumát, sigur Sjúrður Johannesen, fyribyrgingarleiðari. Hann samskiftir nógv við ung, og undir fýra eygum fær hann nógv at vita frá teimum ungu. Tí kemur tað ikki óvart á hann, at ein 20 ára gamal maður er dømdur í einum stórum rúsevnismáli í vikuni**

RÚSEVNI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Sjúrður Johannesen hevur í mong ár arbeitt í barnaverndini hjá Tórshavnar Kommunu. Hann er sosialráðgevi og arbeiðir í dag sum fyribyrgingarleiðari hjá Bláakrossi.

Hann metir tað vera sera álvarsamt, nú ein 20 ára gamal maður er dømdur fyri at hava tikið ímóti og selt nærum 400 tablettir av ecstasy og 100 gramm av amfetamin.

– Tað álvarsama eg serliga síggi í tí er, at tað eru ung fólk, sum hesin hevur fóðrað, og tí er tað gott at hann nú er tikin, sigur Sjúrður Johannesen.

Hann hevur í mong ár arbeitt tætt saman við børnum og ungum. Hann samskiftir nógv við ung, og undir fýra eygum fær hann nógv at vita. Tí er hann ikki bilsin, nú ein er tikin og dømdur.

– Tað hevur verið væntandi, at onkur bleiv tikin nú. Eg tosi nógv við ung, og eg havi vitað tað leingi, at nógv rúsevni eru í løtuni, sigur hann.



*Sjúrður Johannesen*